## Given til City

Manchester City keypti sunnudagin írska landsliðsmálverjan hjá Newcastle, Shey Given. Given hevur í fleiri ár verið roknaður millum fremstu málverjarnar í enskum fótbólti, og skiftið var heldur ikki nakað, sum FCK-venjarin Ståle Solbakken fegnaðist um. – Teir hava fingið ein betri málverja. Hann er tryggari og meira royndur enn Joe Hart, sigur Ståle Solbakken við danska EkstraBladet. FCK skal í vár spæla móti Manchester City í UEFA-Cup kappingini.



## Scolari í øðini

Chelsea-venjarin, Luiz Felipe Scolari, var alt annað enn fegin um dómaraavrikið hjá Mike Riley, tá Chelsea sunnudagin tapti 2-0 móti Liverpool. Frank Lampard fekk reytt kort fyri eina tackling móti Xabi Alonso, og hetta fekk ilt í brasilska venjaran. – Eg vil hava dómaran at hyggja eftir hasi hendingini, so hann kann broyta avgerðina. Veruleikin er, at frispark varð gjørt móti Lampard og ikki øvut. Nú fær hann tríggja daga leikbann, og tað er fullkomuliga burturvið. Hetta er nakað, sum FA (enska fótbóltssambandið) má broyta, segði Scolari við ensku miðlarnar eftir dystin.

# Nýggjar reglur fyri spælaraskifti

**FSF hevur í skrivi til feløgini boðað frá, hvussu samsýningin skal roknast út, tá áhugaspælarar undir 23 ára aldur skifta felag**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*FSF hevur nú sett í gildi nýggjar reglur fyri, hvussu avgendi felagið skal samsýnast, tá spælarar skifta felag*

Í skrivi til feløgini sigur Fótbóltssambandið, at endamálið við reglunum er at tryggja støðug og góð kappingarviðurskifti á føroyska fótbóltsmarknaðinum, sum taka útgangsstøði í tí veruleika, at størru feløgini í alt størri mun taka spælarar frá smærru feløgunum. Og at tørvurin á eini skipan, sum samsýnir smærru feløgunum fyri teirra uppalingar- og menningararbeiðið tí er øktur nógv seinnu árini.

Í nýggju reglunum verður staðfesta, at allir spælarar, sum fáa eina samsýning , ið er størri enn tær útreiðslur, sum felagið hevur av spælaranum, skulu hava sáttmála sum yrkisspælari. Eisini ber nú til hjá feløgunum at gera upp til trý ára langar sáttmálar við áhugaspælarar. Hesir kunnu frítt millum feløg – eisini uttan fyri flytingarvindeygað – men tó við teirri avmarking, at spæliloyvið skal hava verið í nýggja felagnum í minsta lagi 30 dagar, áðrenn spælarin kann taka lut í dysti fyri nýggja felagið.

Og at enda verður eisini ein endurgjaldsskipan sett í verk fyri spælarar, sum eru undir 23 ára gamlir. Áður hevur skipanin verið, at avgevandi felagið hevur havt rætt til eina standardupphædd á 10.000 krónur, men við nýggju reglugerðini eru triggir ymsir faktorar, sum áseta gjaldið.

Tey árini, sum spælari frá 12 til 15 ára aldur, sum spælarin hevur spælt við felagnum, og tey árini, har spælari hevur verið fastur hópur av 2. deildarliði felagsins, kosta 2.000 krónur hvørt.

Árini, sum spælarin hevur verið fastur partur av 1. deildarhópi, kosta 3.000 krónur hvørt.

Og endaliga kostar hvørt Fomula-árið hjá spælaranum 4.000 krónur.

Hesi bæði seinastu kriteriuni eru galdandi, til spælarin er 21 ára gamal.

Tó verður tann avmarking sett á, at ein spælari sum hevur vunnið sær støðu sum fastur maður á Formula-liðnum, ikki kemur undir endurgjaldsregluna. Heldur ikki skal endurgjald latast, um spælari flytur frá Formula- ella 1. deildarfelag til felag, sum spælir í 2. deild.

Í skrivinum staðfestir FSF at enda, at reglurnar eru galdandi fyri øll spælaraskifti, sum eru avtalað 8. november í fjør ella seinni. Hetta er dagurin, tá FSF boðaði feløgunum frá, at tað nú varð arbeitt við nýggjum reglum, og er ígildiskoman av regluni tí ásett soleiðis, at smærri feløg ikki skulu snýtast, hóast skifti eru framd í tíðarbilinum frá 8. november 2008 til 1. februar 2009, tá nýggja reglugerðin er sett í gildi.

# Eru enn við sviðusoð

**Hóast nýggju reglurnar fyri felagsskifti innan føroyskan fótbólt eru ein bati, leggja tær samstundis upp til, at stóru feløgini púrasta lógliga kunnu ogna sær bestu spælararnar hjá smærru feløgunum fyri tilboðsprís**



ÍTRÓTTARKLUMMA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Málið um spælaraskifti hjá Magnusi Olsen frá B71 til B36 í fjør var ein ræðumynd av, hvussu illa stillað smærru feløgini eru, tá tey stóru fara eftir spælarum.

Úrskurðurin hjá Aganevndini í tí málinum staðfesti neyðturvuligheitina í einum endurskoðaðum lógarverki á økinum, og í so máta eru nýggju reglurnar avgjørt ein bati fyri smærru feløgini.

Men tað er neyvan so, at somu smærru feløg eru í nær námind nøgd um nýggju ásetingarnar, sum helst í mesta lagi kunnu geva góðar 20.000 krónur fyri størstu talentini hjá somu smáu feløgum.

Partvíst inniheldur lógarverkið ein klausul um, at spælari, sum hevur vunnið sær status sum fastur maður á Formula-liði felagsins, ikki kemur undir reglurnar, tá hann hevur havt hesa støðu í eitt ár.

Álvaratos. Ein spælari, sum hevur upp ímóti framúr fótbóltsevni, er við nærum 100% vissu fastur maður á Formula-liðnum, longu tá hann er 16-17 ára gamal, og so er nyttan í reglugerðini burtur!

Hartil kundi verið ynskiligt, um reglurnar so ella so í størri mun tóku støði í kvalitetinum á spælaranum. Í Íslandi hevur skipanin verið, at umframt kriteriini, sum FSF nú hevur ásett, økist upphæddin eisini, alt eftir tali av U- og møguliga A-landsdystum. Hóast tað kann vera ymiskt, hvussu spælarar búnast ella sláa til, so vil hetta í flestu førum eisini vera eitt slag av góðskustemplan av spælaranum, og vanliga er tað jú so, at góðska kostar.

Tí veruleikin er, at einar 20.000 krónur fyri ein spælara við framúr fótbóltsevnum er alt ov bíliga sloppið. So kunnu feløgini puffað um, at størri upphæddir í ov stóran mun vilja tøma longu illa sperdu felagskassarnar.

Sannleikin er helst meira, at ein hægri transferupphædd til móðurfelagið einans hevur við sær, at upphæddin til spælaralønir hevði minkað nakað. Og tað vildi nú ikki verið tann størsta vanlukkan, sum er hend føroyskum fótbólti.